RannTeld

Starv sum
# bókhaldari
leyst at søkja

Fyri ein av kundum okkara søkja vit eftir fólki at starvast í bókhaldinum. Talan er fyribils um eitt hálvtíðarstarv við møguleika fyri at starvið verður fulltíðarstarv seinni.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv innan eitt øki í støðugari menning.

Vit vænta at tú hevur royndir innan bókhaldsarbeiði og kunnleiki til Concord forrit er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Atla Klein Olsen á tlf. 318903 ella rannteld@post.olivant.fo

Skrivlig umsókn skal vera RannTeld í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. juni 2005. Send umsóknina til Sp/f RannTeld, M. Heinasonargøta 23, 1. hædd, Postrúm 205, 110 Tórshavn.

*Sp/f RannTeld er eitt bókhaldsvirkið í sera stórari menning, ið millum annað átekur sær av at føra bókhald fyri størri og smærri virkir og fyritøkur, bæði privat og partafeløg, at ráðgeva í bókhalds-, MVG- og skattaspurningum, at innkrevja skuld og mangt annað tílíkt. Á RannTeld eru í løtuni 4 fólk, sum arbeiða við nýmótans tólum og forritum, og altíð eru fús til at átaka sær uppgávur innan nevndu økir.*

Alzheimerfelagið

# Almennur fyrilestur um demens

Fríggjakvøldið 3. juni kl. 19.00 heldur viðurkendi ergo- og familjuterapeuturin Jane Verity almennan fyrilestur undir heitinum: »Lær at síggja við hjartanum«. Fyrilesturin verður í hølunum hjá Føroya Tele, Klingran 5, Hoyvík. Kostnaður 50 kr. Øll eru vælkomin.

**Alzheimerfelagið**

Alzheimerfelagið

# Neytamykju-kappingin hjá Alzheimerfelagnum

Hesir seðlar hava vunnið: nr. 1059, 1060, 1099 og 1100. Vinningarnir, ið eru 1 oksafjórðingur til hvønn seðil, fáast við at ringja 313102 ella tlf. 260358. Alzheimerfelagið takkar hjartaliga fyri stuðulin.

**Nevndin**

Sniðgev tín egna skógv



mi adidas

7. - 11. juni bílegg tíð

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR - N. Finsensgøta 5
Postsmoga 268 - 110 Tórshavn - Tel 35 53 00

# FAROE LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 24. juni 2005, kl. 13.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **bygning á matr. nr. 90d, Svínoy.**

Ognin er ein virkisbygningur 544 m² til støddar í einari hædd, gjørdur úr timbri og betong og taktur við icopal. Bygningurin stendur á leigaðum øki og hevur verið nýttur til smoltframleiðslu. Til bygningin hoyra rakstrargøgn.

Sølan er umbiðin av **Christiani Andreasen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20040777),** sum kann geva upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya Fútarætt.

**Føroya Fútarættur**
hin 27. mai 2005

# Vinnuvegleiðari

**Arbeiðsuppgávurnar.**
- At menna arbeiðsmøguleikarnar hjá arbeiðstarnaðum fólkum. Hetta við at skapa samskifti við arbeiðsgevarar kring landið við atliti til, at fáa teir at lata hurðar upp fyri fólki við skerdum arbeiðsførleika, soleiðis at arbeiðsmarknaðurin verður rúmligari.
- At greiða hvønn áhuga og førleika tann arbeiðstarnaði hevur og at útføra ráðlegging fyri viðkomandi. At hava um hendi samskifti við arbeiðstarnaða.
- At skipa fyri arbeiðsvenjingum og útvega størv til arbeiðstarnaði fólk.

**Førleikakrøv.**
- Hevur hóskandi útbúgving, so sum sosialráðgevi, lærari, pedagogur, sjúkrarøktarfrøðingur ella drúgvar royndir á arbeiðsmarknaðinum.
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevnir.
- Hevur koyrikort.

**Vit bjóða.**
- Nýggjar og spennandi avbjóðingar.
- Fjøltáttað og sjálvstøðugt arbeiði.
- Tætt samstarv við fyristøðufólkið.
- Møguleika fyri skiftandi arbeiðstíðum.
- Skeiðsmøguleikar.

**Lønar- og setanartreytir.**
- Sosialráðgevi ella pedagogur, verður løntur sambært avvarðandi sáttmála. Fólk við øðrum sosialfakligum førleika, verða lønt sambært starvsmannafelagssáttmálanum.
- Starvið verður sett við beinleiðis tilvísing til fyristøðufólkið.
- Starvið verður at seta 1. august 2005 ella skjótast tilber.
- Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2005.

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
**Smiðjugerð 6, kj.**
**Postboks 301**
**110 Tórshavn**
***viðmerk á brævbjálvan: "umsókn vinnuvegleiðari".***

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3820,** P/F Shin Nihon Farming, 530 Fuglafjørður.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Bogi Nielsen, 530 Fuglafjørður (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Odd Eliasen, Mørkin 8, 530 Fuglafjørður (nevndarformaður)
**Farin frá sum nevndarformaður:** Justinus Leivssonur Justinussen, 480 Skáli
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Bogi Nielsen, 530 Fuglafjørður
**Innkomin sum stjóri:** Bogi Jacobsen, Miðrás 5, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 27. mai 2005

Kristin Balle

